# Samstarvið skal byrja í Hovi

**Landsstýrið hevur gjørt av, at miðnámsskúlin og heilsuskúlin í Suðuroynni verða bygdir í einum nýggjum skúladepli í Hovi. Landsstýrið heldur, at skúladepilin kann gerast grundarlagið undir framtíðar samstarvið millum kommunurnar í oynni**

SKÚLADEPIL
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Hósdagin gjørdi landsstýrið av, at miðnámsskúlin og heilsuskúlin í Suðuroynni verða bygdir í einum nýggjum skúladepli í Hovi. Harvið var ætlanin um at byggja miðnámsskúla í Vági slept.

Nýggi skúladepilin skal verða grundarlag undir einum samstarvi millum kommunurnar í Suðuroynni, heldur landsstýrið.

– Tað snýr seg um ein skúladepil, sum øll oyggin eigur lut í. Skúlin fer at liggja sum miðdepil fyri alla oynna, og vegurin er stuttur til bæði Vágs og Tvøroyri. Skúladepilin verður við til at menna oynna og fer at skapa møguleikar fyri samstarvi innan onnur øki, sigur eitt samt landsstýri, sum ikki vil hoyra talan um at broyta avgerðina aftur.

### Gjørdu klárt til einki

Fyri tveimum árum síðani samtykti løgtingið, at miðnámsskúli skuldi byggjast í Vági, og síðani hevur verið arbeitt við fyrireikingunum til skúlan. Grivið er út fyri skúlanum, og klárt er at fara undir byggingina.

Men seinastu mánaðirnar hevur verið sum vent í holuni, tí landsstýrið hevur heldur vilja havt skúlan at liggja meira miðskeiðis í oynni, og tá ið hetta kom fram var samstundis róð fram undir, at eitt røktarheim skuldi byggjast í Vági ístaðin fyri skúlan.

Eini meiriluti í Vágs býráði vrakaði hesum uppskoti, og hóast tað síðani hevur verið roynt at finna eina semju í oynni, so eydnaðist tað ikki.

Nú hevur landsstýrið so gjørt av, at skúlin verður bygdur í Hovi, og tilboðið til kommunurnar í Suðuroynni um lagaliga fígging til eitt røktarheim stendur við.

### Fíggjarligir fyrimunir

Landsstýrið heldur, at skúladepilin í Hovi verður eitt breitt og dynamiskt skúlaumhvørvi, sum fer at skapa áhuga og eggja ungdómi – eisini aðrastaðni frá - at útbúgva seg í Suðuroynni.

Ætlanin er, at skúladepilin í Hovi skal verða miðnámsskúli, heilsuskúli og eisini umfata handilsskúlaútbúgvingar umframt møgulig onnur skúlatilboð.

– Depilin fer at vaksa um møguleikarnar fyri breiðum samstarvi, námsfrøðiligum íblástri og menning hjá lærarum.

– Fíggjarligir fyrimunir eru við at byggja skúladepil í Hovi. At byggja skúlarnar saman gevur betri og bíligari rakstur, sterkari skúlafyrisiting umframt møguleika at fullnýta felags hølir. Við at byggja skúladepilin í Hovi, metir landsstýrið sostatt at fleiri fyrimunir eru enn vansar, sigur landsstýrið í sínari fráboðan.

# – Besta loysnin fyri Suðuroynna

**Borgarstjórin í Porkeri heldur, at skúladepilin í Hovi er ein góður møguleiki at samansjóða alla Suðuroynna, og hann tekur undir við, at eitt røktarheim verður bygt í Vági**

SUÐUROY
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Borgarstjórin í Porkeris kommunu tekur undir við, at skúladepil verður gjørdur í Hovi, og hann heldur, at nú skulu kommunurnar í Suðuroynni virka fyri at fáa eitt røktarheim eisini.

– Tað er tann besta loysnin fyri Suðuroynna, at miðnámsskúlin verður bygdur í Hovi. Hetta er ein góður møguleiki at samansjóða alla oynna, og vit eiga at taka allar teir møguleikar, sum vit fáa, sigur Eli Frederiksen.

– Nú skal ætlanin um at byggja røktarheim fylgjast upp, tí tað er stórur tørvur á einum røktarheimi í Suðuroynni, sigur hann.

### Tær smáu tiknar við upp á ráð

Tær smáu kommunurnar í Suðuroynni hava verið meira heitar fyri ætlanini at gera skúladepilin í Hovi heldur enn í Vági, hóast tær báðar stóru kommunurnar boðaðu frá, at tær vildu hava skúlan í Vági og røktarheimið á Tvøroyri.

– Á fundinum við løgmann og landsstýris-menninar hósdagin, tóku umboðini fyri tær smáu kommunurnar undir við at gera skúlan í Hovi. Hetta snýr seg ikki bara um tær stóru kommunurnar, og tí er tað gott, at landsstýrið eisini hevur tikið smáu kommunurnar við upp á ráð, sigur Eli Frederiksen.

Borgarstjórarnir á Tvøroyri og í Fámjin vóru ikki á fundinum, og borgarstjórin í Vági boðaði frá, at eini meiriluti í Vágs býráð tekur ikki undir við at flyta skúlan úr Vági til Hovs, hóast hon sjálv heldur, at hetta er ein góð loysn, um eitt røktarheim ístaðin verður bygt í Vági.



*Fimm av kommununum í Suðuroynni vóru umboðaðar, tá ið landsstýrið hósdagin boðaði frá sínari avgerð um, at skúlamiðdepil verður bygdur í Hovi*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Arbeiða víðari

Nú landsstýrið hevur tikið eina avgerð um, at miðnámsskúlin í Suðuroynni skal byggjast í Hovi heldur enn í Vági, vónar borgarstjórin í Porkeri, at kommunurnar í Suðuroynni ikki fara at stríðast, men fara at arbeiða víðari við einum røktarheimi.

– Tað hevur ligið í kortunum, at eitt røktarheim skal gerast í Vági, og tað taka vit undir við. Vónandi verður nú ikki nakað stríð um hetta røktarheimið, tí tað er umráðandi, at vit taka av teimum møguleikum, sum vit fáa.

– Tilboðið um fígging frá landsstýrinum til eitt røktarheim stendur við, og tí skulu vit fáa gongd á tað arbeiðið sum skjótast, sigur Eli Frederiksen.

Vágur og Tvøroyri samdust um at mæla til, at miðnámsskúlin skuldi byggjast í Vági og røktarheimið á Tvøroyri, men hesum tekur hann ikki undir við.

– Eg haldi ikki, at tað er rætt at byggja eitt røktarheim á Tvøroyri, tí har er eitt røktarheim frammanundan. Vit mugu royna at spjaða eitt sindur í Suðuroynni, og tí er rætt at byggja nýggja røktarheimið í Vági, heldur Eli Frederiksen.

## Mælir til størri samstarv

**– Tað verður tosað, sum um eingir vegir eru í Suðuroynni. Alt skal liggja í bakgarðinum, men tað er púra vanligt allastaðni í heiminum, at fólk koyra til og frá arbeiði, sigur John Johannessen, løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin, sum heitir á suðuroyingar um at samstarva sum ein oyggj**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

– Tað var óheppið at flyta byggingina av miðnámsskúlanum, tá ið økið var grivið út í Vági, og at blanda eitt ±røktarheim upp í málið. Men nú avgerðin er tikin, mugu vit liva við henni.

Tað sigur John Johannessen, sum umboðar Javnaðarflokkin í mentanarnevndini hjá løgtinginum. Hann er valdur í Havn, men vaks upp í Suðuroy.

– Ein meiriluti í samgonguni tók undir við at byggja ein skúladepil í Hovi, og tá ið løgtingsmenninir úr Suðuroy eisini tóku undir við tí, so má mann ganga út frá, at teir vita, hvat er best fyri oynna, sigur John Johannessen.

### Vegir eru í Suðuroy

Javnaðartingmaðurin mælir til, at suðuroyingar virða avgerðina um skúlan og arbeiða saman um menna oynna.

– Nú avgerðin er tikin, fari eg at heita á suðuroyingar um arbeiða saman fyri at fáa eitt røktarheim í oynna eisini. Skal tosast um at menna Suðuroynna mótvegis restina av landinum, mugu suðuroyingar arbeiða saman sum ein oyggj, sigur John Johannessen.

– Tað verður tosað, sum um eingir vegir eru í Suðuroynni. Alt skal liggja í bakgarðinum, men tað er púra vanligt allastaðni í heiminum, at fólk koyra til og frá arbeiði, og tí eiga suðuroyingar at samstarva meira sum ein oyggj, heldur hann.

## Borgarstjórin í Vági bíðar

Kirsten Strøm Bech hevur ikki hug at leggja nakað afturat kjakinum, nú landsstýrið hevur gjørt av, at miðnámsskúlin, sum ætlanin var at byggja í Vági, ístaðin skal byggjast í Hovi.

– Eg havi fyrr sagt, havt eg haldi um hetta, og eg havi einki at leggja afturat, sigur borgarstjórin í Vági.

Kirsten Strøm Bech hevur spælt við opnum kortum, hóast hon sum borgarstjórin endaði í truplu støðuni at vera í minniluta í málinum. Hon tekur undir við, at røktarheim verður bygt í Vági heldur enn ein miðnámsskúli, men hon hevur samstundis skula virt avgerðina hjá einum meiriluta í Vágs býráð, sum vil hava miðnámsskúla heldur enn røktarheim.

– Nú bíði eg eftir, at uppskotið verður lagt fram í løgtinginum, men um tað eru býráðslimir, sum vilja hava málið til viðgerðar aftur, so taka vit tað upp, sigur Kirsten Strøm Bech.

Tað eydnaðist ikki Sosialinum at fáa eina viðmerking frá borgarstjóranum á Tvøroyri fyrrapartin týsdagin.

**ek**